# Frágreiðing um kommunalu roknskapirnar fyri 2018

Sambært kommunustýrislógini skulu kommunustýrini hava samtykt og sent landsstýrinum ársroknskapin fyri undanfarna árið innan 1. juni. Fíggjarmálaráðið hevur samantalt ársroknskapirnar fyri 2018, og verður her tikið samanum fíggjarligu heildargongdina hjá føroysku kommununum í árinum. Fíggjarmálaráðið hevur í hesum sambandi ikki gjøgnumgingið einstøku roknskapirnar í mun til játtanareftirlit ella í mun til lógarkrøv annars, men eru tølini niðanfyri tikin beint úr ársroknskapunum.

Í talvuni niðanfyri sæst samantalt úrslit fyri kommunurnar fyri 2018:

***Ársroknskapur 2017 og 2018 umframt fíggjarætlan 2019 samantalt fyri allar føroyskar kommunur***

| | (tús. Kr.) | 2017 | 2018 | *%-broyting* | 2019FÆ | *%-broyting* |
|---|---|---|---|---|---|---|
| § 1-7 | Rakstur, netto | 1.745.399 | 1.859.585 | *(+6,5%)* | 1.924.652 | *(+3,5%)* |
| | Løgur, netto | 517.134 | 712.408 | *(+37,8%)* | 722.012 | *(+1,3%)* |
| **§ 1-7** | **Tilsamans** | **2.262.533** | **2.571.993** | ***(+13,7%)*** | **2.646.664** | ***(+2,9%)*** |
| § 20 | Rentur, netto | 28.065 | 27.495 | *(-2,0%)* | 21.532 | *(-21,7%)* |
| | Skattur v.m. | 2.417.554 | 2.487.228 | *(+2,9%)* | 2.427.386 | *(-2,4%)* |
| **§ 20** | **Tilsamans** | **2.389.489** | **2.459.733** | ***(+2,9%)*** | **2.405.854** | ***(-2,2%)*** |
| | **RLÚ-úrslit** | **126.956** | **-112.260** | ***(-188,4%)*** | **-240.810** | ***(+114,5%)*** |

*Viðm.: "Rakstur, netto" er rakstrarútreiðslur minus rakstrarinntøkur. Samsvarandi er við "Løgur, netto" og "Rentur, netto". "Skattur v.m." eru øll sløg av skatti minus rentustuðul.*

Til samanberingar vísir talvan eisini samantald roknskapartøl fyri 2017 og fíggjarætlanartøl fyri 2019[1] umframt prosentbroytingar í mun til árið frammanundan.

## Stórur rakstrar- og løguvøkstur broytti avlop til hall

Samanlagt høvdu kommunurnar hall á 112 mió. kr. í 2018. Hetta var ein afturgongd á 239 mió. kr. í mun til avlopið á 127 mió. kr. í 2017. Talan var samstundis um fyrstu ferð síðani 2013, at kommunurnar samanlagt høvdu hall. Broytingin stóðst av, at meðan inntøkur frá skatti v.m. bert øktust við 70 mió. kr. hækkaðu útreiðslurnar til rakstur og løgur við tilsamans 310 mió. kr.

## Inntøkur og útreiðslur størri enn ætlað

Í fíggjarætlanunum fyri 2018 varð upprunaliga roknað við halli á 145 mió. kr., so hóast avlop varð vent til hall, gjørdist staðfesta úrslitið hjá kommunala geiranum 33 mió. kr. betri enn upprunaliga ætlað. Orsøkin til hetta var m.a., at samlaðu inntøkurnar av skatti v.m. vóru 160 mió. kr. hægri enn væntað. Hinvegin vóru løguútreiðslurnar 92 mió. kr. hægri enn upprunaliga ætlað og rakstrar- og rentuútreiðslurnar vóru ávikavist 29 og 5 mió. kr. meir enn upprunaligu ætlanirnar fyri 2018 vístu.

[1] Fíggjarætlanartølini eru uttan eykajáttanir.

**Budgetterað er eisini við halli fyri 2019**
Ein samanteljing av fíggjarætlanunum fyri 2019 vísir, at roknað verður við einum halli á 241 mió. kr. Hetta merkir, at kommunurnar samanlagt rokna við einum úrsliti fyri 2019, ið er 129 mió. kr. lakari enn staðfesta hallið fyri 2018. Umframt øktar rakstrarútreiðslur á 65 mió. kr. og øktar løguútreiðslur á 10 mió. kr., er orsøkin, at kommunurnar budgettera við lægri rentuútreiðslum á 6 mió. kr. og inntøkum frá skatti v.m., ið eru 60 mió. kr. lægri enn i 2018. Higartil gevur gongdin í fyribilsskattinum tó ikki ábendingar um, at skattainntøkurnar fara at minka í 2019.

**Hallini**
Størstu hallini í 2018 vóru hjá hesum kommunum:

**Størstu kommunalu hallini í 2018**

| *(tús. kr.)* | RLÚ-úrslit (hall) | *Løgur í árinum* | Bruttoskuld við ársenda | Nettoskuld við ársenda | Nettoskuld per íbúgva |
|---|---|---|---|---|---|
| Tórshavnar kommuna | -106.883 | *354.114* | 328.214 | -164.708 | -7,6 |
| Klaksvíkar kommuna | -13.061 | *75.863* | 166.178 | 93.350 | 18,0 |
| Eysturkommuna | -12.563 | *43.458* | 29.255 | -1.632 | -0,8 |
| Vestmanna kommuna | -8.761 | *27.256* | 32.940 | 25.922 | 21,0 |
| Nes kommuna | -7.395 | *16.303* | 29.609 | 21.389 | 16,1 |

*viðm.: Tøl sambært innkomnum roknskapum.*

Tað hevur sjálvandi stóra ávirkan á úrslitið hjá samlaða geiranum, at báðar tær størsta kommunurnar í landinum høvdu hall. Samanlagt høvdu Tórhavnar og Klaksvíkar kommuna hall á 120 mió. kr., ið varð 8 mió. kr. størri enn samlaða hallið fyri allan tann kommunala geiran. Hetta merkir hinvegin, at hinar 27 kommunurnar samanlagt høvdu avlop á umleið 8 mió. kr. í 2018.

Hall í kommunalum roknskapum hava ofta samband við lutfallsliga stórar løguútreiðslur. Fyri 2018 kann í hesum sambandi m.a. vísast á havna- og skúlabygging í Tórshavn, skúlabygging og byggibúning av ídnaðarøki í Klaksvík og byggibúning til bústaðir í Eysturkommunu og Vestmanna kommunu.

**Avlopini**
Størstu avlopini í 2018 vóru hjá hesum kommunum:

**Størstu kommunalu avlopini í 2018**

| *(tús. kr.)* | RLÚ-úrslit (avlop) | *Løgur í árinum* | Bruttoskuld við ársenda | Nettoskuld við ársenda | Nettoskuld per íbúgva |
|---|---|---|---|---|---|
| Runavíkar kommuna | 10.104 | *46.978* | 139.999 | 106.465 | 26,4 |
| Tvøroyrar kommuna | 8.952 | *11.107* | 60.467 | 19.866 | 11,6 |
| Vága kommuna | 7.950 | *13.024* | 59.251 | 36.306 | 17,4 |
| Sørvágs kommuna | 6.814 | *8.563* | 32.519 | 18.878 | 15,7 |
| Viðareiðis kommuna | 5.460 | *2.544* | 12.374 | 350 | 1,0 |

*viðm.: Tøl sambært innkomnum roknskapum*

Runavíkar kommuna hevði størsta avlopið, ið var góðar 10 mió. kr., meðan avlopið hjá Tvøroyrar kommuna var slakar 9 mió. kr. Avlopini hjá Vága kommunu, Sørvágs kommunu og Viðareiðis kommunu vóru nakað minni enn hetta, og eisini vóru aðrar kommunur við minni avlopum. – Stór avlop í kommunuroknskapum kunnu til tíðir hava samband við, at lítið av peningi verður brúkt til løgur. Líkt er tó ikki til, at kommunurnar við størstu avlopunum í 2018, hava hildið heilt aftur við løguútreiðslum.

## Kommunala skuldin

Talvan niðanfyri vísir, at eins og undanfarin ár er nettoskuldin savnað hjá teimum miðalstóru kommununum, t.e. kommunur við fleiri enn 450 íbúgvum, tó Tórshavnar kommuna undantikin.

**Skuld við ársenda 2018**

| | Skuld | | | Nettoskuld |
|---|---|---|---|---|
| *(tús. kr.)* | Brutto | Netto | Íbúgvar | per íbúgva |
| Tórshavnar kommuna | 328.214 | -164.708 | 21.592 | -7,6 |
| *excl. Tórshavnar havn* | *80.240* | *-211.086* | *21.592* | *-9,8* |
| Kommunur yvir 450 íbúgvar annars | 809.233 | 434.829 | 27.634 | 15,7 |
| Kommunur undir 450 íbúgvar | 38.364 | -13.480 | 2.110 | -6,4 |
| **Allar kommunur** | **1.175.811** | **256.641** | **51.336** | **5,0** |

Við ársenda 2018 var samlaða nettoskuldin hjá kommununum økt til slakar 257 mió. kr. Til samanberingar var nettoskuldin 144 mió. kr. við árslok í 2017. Í sama tíðarskeiði øktist bruttoskuldin úr 1,1 til knappar 1,2 mia. kr. Økingin stavar m.a. frá lántøku í sambandi við útbygging av Tórshavnar Havn.

## Bruttoskuld í mun til álíkning

Í talvuni niðanfyri eru kommunurnar settar upp eftir bruttoskuld í mun til skattainntøku frá persónsskatti, um hesin varð álíknaður við 23%.

Í mun til talvuna longur niðri, ið er sorterað eftir nettoskuld í mun til álíkning, kann t.d. verða lagt merki til, at Fuglafjarðar kommuna og Tvøroyrar kommuna eru meira frammalaga í hesari talvuni. Orsøkin er, at við árslok 2018 høvdu hesar kommunur lutfalsliga nógvan tøkan pening, umframt lutfalsliga stóra goymslu og áogn, ið saman við tøkum peningi er munurin millum bruttoskuld og nettoskuld.

| | | Tús. kr. | |
|---|---|---|---|
| Kommuna | Skuld / Álíkning | Brutto-skuld | Álíkning við 23% |
| Fuglafjarðar | 114% | 76.792 | 67.156 |
| Tvøroyrar | 91% | 60.467 | 66.724 |
| Vágs | 88% | 39.905 | 45.152 |
| Sands | 86% | 13.832 | 16.145 |
| Runavíkar | 85% | 139.999 | 164.113 |
| Skopunar | 76% | 11.043 | 14.450 |
| Vága | 76% | 59.251 | 78.177 |
| Klaksvíkar | 74% | 166.178 | 224.247 |
| Viðareiðis | 74% | 12.374 | 16.781 |
| Sørvágs | 70% | 32.519 | 46.636 |
| Hovs | 69% | 2.295 | 3.315 |
| Sunda | 69% | 50.678 | 73.245 |
| Vestmanna | 66% | 32.940 | 50.075 |
| Nes | 59% | 29.609 | 49.783 |
| Hvannasunds | 59% | 9.131 | 15.361 |

| | | Tús. kr. | |
|---|---|---|---|
| Kommuna | Skuld / Álíkning | Brutto-skuld | Álíkning við 23% |
| Kvívíkar | 59% | 14.719 | 25.014 |
| Hvalbiar | 58% | 14.700 | 25.380 |
| Skálavíkar | 57% | 2.487 | 4.376 |
| Sjóvar | 54% | 23.577 | 43.471 |
| Fámjins | 51% | 1.484 | 2.902 |
| Eiðis | 49% | 13.769 | 28.062 |
| Porkeris | 42% | 4.371 | 10.500 |
| Kunoyar | 36% | 2.148 | 5.908 |
| Tórshavnar | 34% | 328.214 | 963.240 |
| Eystur | 31% | 29.255 | 95.638 |
| Sumbiar | 29% | 3.360 | 11.579 |
| Fugloyar | 27% | 701 | 2.572 |
| Skúvoyar | 1% | 9 | 1.573 |
| Húsavíkar | 0% | 4 | 3.699 |
| **Tilsamans** | **55%** | **1.175.811** | **2.155.274** |

**Nettoskuldin hjá flestu kommunum er minni enn eina hálva álíkning**

Talvan niðanfyri vísir nøkur høvuðstøl frá roknskapunum fyri 2018. Her sæst m.a., at kommunurnar, sum við árslok 2018 høvdu størst nettoskuld í mun til eina álíkning á 23 prosent, vóru Vágs kommuna, Skopunar kommuna, Runavíkar kommuna og Vestmanna kommuna. Hetta vóru samstundis einastu kommunur, sum við árslok 2018 høvdu nettoskuld, ið var størri enn eina hálva álíkning, roknaða við 23 prosentum í kommunuskatti.

Kommunurnar við størst nettoogn í mun til eina álíkning vóru Fugloyar kommuna og Húsavíkar kommuna. Hesar høvdu báðar nettoogn, ið svaraði til meir enn eina álíkning. Talan er tó ikki um stórar upphæddir í samlaðum kommunuhøpi, tí samanlagt er nettoognin hjá hesum báðum kommunum minni enn 10 mió. kr.

Samumtikið er fíggjarliga rásarúmið hjá flestu kommunum gott. Hóast hall og skuldarøking í 2018 hevur kommunali geirin framvegis ikki stóra nettoskuld, og sett í mun til skuldarmarkið á 23% hava kommunurnar samanlagt rúm fyri at økja nettoskuldina við sløkum 2 mia. kr.

**Yvirlit yvir kommunalu roknskapirnar 2018, sum innkomið** *(sorterað eftir nettoskuld í mun til eina álíkning roknaða við kommunuskatti á 23%)*

| Kommununavn | Fólkatal 31/12-18 | Kommunu skattaprosent | Rakstur | Løgur | Rentur | Skattur v.m. | RLÚ-úrslit | Bruttoskuld | Nettoskuld | NS/íbúgva (tús.kr.) | Nettoskuld / 23%-álíkning |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vágs | 1.342 | 21,95% | 52.791 | 7.198 | 330 | -62.535 | 2.215 | 39.905 | 31.618 | 23,6 | 0,70 |
| Skopunar | 461 | 21,75% | 19.283 | 1.235 | 88 | -19.956 | -652 | 11.043 | 9.990 | 21,7 | 0,69 |
| Runavíkar | 4.038 | 22,00% | 152.904 | 46.978 | 10.278 | -220.264 | 10.104 | 139.999 | 106.465 | 26,4 | 0,65 |
| Vestmanna | 1.235 | 21,50% | 44.910 | 27.256 | 429 | -63.834 | -8.761 | 32.940 | 25.922 | 21,0 | 0,52 |
| Vága | 2.087 | 22,00% | 76.784 | 13.024 | 676 | -98.434 | 7.950 | 59.251 | 36.306 | 17,4 | 0,46 |
| Nes | 1.329 | 20,50% | 46.040 | 16.303 | 522 | -55.471 | -7.395 | 29.609 | 21.389 | 16,1 | 0,43 |
| Klaksvíkar | 5.183 | 20,75% | 198.926 | 75.863 | 6.316 | -268.043 | -13.061 | 166.178 | 93.350 | 18,0 | 0,42 |
| Sands | 520 | 21,00% | 19.904 | 6.913 | 93 | -24.067 | -2.843 | 13.832 | 6.538 | 12,6 | 0,40 |
| Sørvágs | 1.202 | 21,70% | 45.995 | 8.563 | 258 | -61.627 | 6.814 | 32.519 | 18.878 | 15,7 | 0,40 |
| Hvalbiar | 674 | 19,95% | 25.168 | 2.873 | 158 | -30.165 | 1.966 | 14.700 | 9.904 | 14,7 | 0,39 |
| Porkeris | 319 | 20,75% | 12.478 | 15 | 27 | -12.948 | 427 | 4.371 | 3.912 | 12,3 | 0,37 |
| Eiðis | 725 | 18,75% | 23.386 | 6.615 | 90 | -29.466 | -627 | 13.769 | 9.173 | 12,7 | 0,33 |
| Sjóvar | 1.065 | 21,00% | 38.686 | 12.943 | 821 | -50.917 | -1.532 | 23.577 | 13.390 | 12,6 | 0,31 |
| Tvøroyrar | 1.715 | 21,90% | 65.441 | 11.107 | 452 | -85.951 | 8.952 | 60.467 | 19.866 | 11,6 | 0,30 |
| Kvívíkar | 592 | 20,75% | 26.439 | 8.767 | 62 | -29.833 | -5.434 | 14.719 | 7.004 | 11,8 | 0,28 |
| Fuglafjarðar | 1.554 | 21,50% | 57.107 | 30.973 | 1.083 | -90.397 | 1.233 | 76.792 | 16.166 | 10,4 | 0,24 |
| Sumbiar | 363 | 19,00% | 12.149 | 3.480 | 5 | -14.308 | -1.324 | 3.360 | 2.581 | 7,1 | 0,22 |
| Skálavíkar | 139 | 22,00% | 6.701 | -42 | 27 | -7.459 | 773 | 2.487 | 876 | 6,3 | 0,20 |
| Sunda | 1.795 | 21,50% | 62.667 | 26.702 | 497 | -88.766 | -1.099 | 50.678 | 10.502 | 5,9 | 0,14 |
| Hovs | 101 | 20,00% | 4.079 | 91 | 14 | -4.309 | 127 | 2.295 | 329 | 3,3 | 0,10 |
| Viðareiðis | 361 | 20,50% | 12.509 | 2.544 | 188 | -20.702 | 5.460 | 12.374 | 350 | 1,0 | 0,02 |
| Eystur | 2.117 | 21,00% | 82.586 | 43.458 | 924 | -114.406 | -12.563 | 29.255 | -1.632 | -0,8 | -0,02 |
| Fámjins* | 79 | 19,00% | 3.135 | 0 | 23 | -3.724 | 566 | 1.484 | -450 | -5,7 | -0,16 |
| Tórshavnar | 21.592 | 19,00% | 739.492 | 354.114 | 4.103 | -990.825 | -106.883 | 328.214 | -164.708 | -7,6 | -0,17 |
| Kunoyar | 146 | 18,50% | 5.283 | 356 | -1 | -7.780 | 2.140 | 2.148 | -2.453 | -16,8 | -0,42 |
| Hvannasunds | 413 | 19,75% | 14.430 | 1.180 | 27 | -20.652 | 5.330 | 9.131 | -7.687 | -18,6 | -0,50 |
| Skúvoyar | 42 | 16,00% | 1.494 | 3.013 | 6 | -1.787 | -2.726 | 9 | -1.003 | -23,9 | -0,64 |
| Húsavíkar | 110 | 21,00% | 5.320 | 28 | 0 | -6.179 | 831 | 4 | -5.262 | -47,8 | -1,42 |
| Fugloyar* | 37 | 16,00% | 3.498 | 858 | -1 | -2.423 | -1.933 | 701 | -4.673 | -126,3 | -1,82 |
| | **51.336** | **20,24%** | **1.859.585** | **712.408** | **27.495** | **-2.487.228** | **-111.945** | **1.175.811** | **256.641** | **5,0** | **0,12** |

Rakstur er rakstrarútreiðslur minus rakstrarinntøkur. Tilsvarandi er fyri løgur og rentur.
Skattur v.m. er kommunuskattur, felagsskattur, eftirlønarskattur, DIS/FAS-endurgjald og rentustuðul (frádrigin).
* Hava ikki latið samtyktan roknskap inn